# Eina góða krimi at



*Tað má sigast at vera eitt kvetti, at tað er eydnast einum krimihøvunda sum Arne Dahl at smugla góðan skaldskap inn í krimibókmentirnar, sum annars ikki hava serliga gott orð á sær, heldur danski krimiserfrøðingurin, Peter Kirkegaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Krimilesarar elska at verða píndir fyri síðani at njóta sælu grøðingina, tá rithøvundurin fær alt í rættlag aftur, sigur krimiserfrøðingurin Peter Kirkegaard, sum herfyri smuglaði svarta lambið í bókmentum inn á Fróðskaparsetrið**

## Bókmentir



Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Tær sparka konsekvent allar aðrar av metsølulistunum, fáa lesarar kring allan heim at halda ondini í spenningi og gera sínar skaparar til heimsstjørnur. Kortini tvíhalda bókamentafólk um, at krimisøgur sjáldan eru verdar at brúka tíð uppá. Røttum skaldskapi kunnu tær í øllum førum ikki bólkast saman við, verður oftast sagt.

Tí kann tað undra, at tað herfyri eydnaðist danska krimiserfrøðinginum Peter Kirkegaard at smugla eitt heilt skeið í krimibókmentum inn á Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum.

Peter Kirkegaard smílist eitt sindur loyndarfullur

– Tað hongur saman við, at tað er eydnast summum høvundum at smugla góðan skaldskap inn í krimibókmentir. Á hesum skeiðnum havi eg millum annað víst á svenska høvundan Arne Dahl sum eitt frálíkt dømi um, at at tað bæði innihaldsliga og málsliga ber væl til at lyfta krimibókmentir upp á eitt skaldsligt støði, sum stendur mát, sigur krimiserfrøðingurin.

### Samseki krimilesarin

Peter Kirkegaard er tó skjótur at viðganga, at tað finnast ótrúliga nógvar vánaligar krimibøkur, og at hesar í stóran mun hava sett alla krimisjangruna í bás sum lættisoppalesnað.

– Flestu krimibøkur eru stutt sagt ov illa skrivaðar. Tær breggja sær av at endurspegla veruleikan, bara við at nevna hann, men uttan at koma við nýggjum vinklum á evnini, tær viðgera. Víst kennir lesarin seg aftur í trupulleikunum, men tá gátan er loyst, er alt við tað sama aftur, og søgan er gloymd, sigur Kirkegaard, sum hinvegin heldur tað vera lætt at skilja, hví fólk eru so hugtikin av hesum søgunum - eina lítla løtu í hvussu er.

– Tað er jú ein vakur tanki, at beint sum stóra vanlukkan hóttir, kemur ein detektivur, ein journalistur ella politiið eftir øllum tí ónda og syrgir fyri at rudda upp. So kunnu vit øll kenna okkum minni einsamøll eina løtu og droyma søtt um, at rættvísið tíbetur sigraði. Sjálvt um onki í veruleikanum hevur flutt seg ein tumma.

At lesarin kortini er so skjótur at tríva í næstu krimibók, krevur allíkavæl eina forklåring, sum stingur eitt sindur djúpri, heldur Peter Kirkegaard. Sambært honum mugu krimilesarar sigast at vera eitt slag av masochistum, sum finna fragd í at lata seg pína, fyri síðani at njóta sæla nøgdsemið, tá stóra grøðingin kemur.